Nýtt Suðuroyarskip skal nú projekterast

Tann nýggi Smyril fer at sigla 21 míl og tá fer tað at taka ein góðan hálvan annan tíma at sigla ímillum Suðuroynna og Havnina

ÁKI BERTHOLDSEN

Arbeiðið at fyrireika bygg-ingina av einum nýggjum strandfaraskipi til surðuroyarsiglingina gongur sína gongd.

Og nú eru fyrireikingarnar komnar so langt, at arbeiðið at projektera tann nýggja Smyrilin, verður boðið út longu í summar.

Magnus Magnussen, tekniskur stjóri á Strandferðsluni, sigur, at arbeiðið er nú so mikið langt, at ætlanin er at bjóða arbeiðið at projektera skipið út longu nú, áðrenn summarfrítíðin byrjar av álvara.

Hann sigur, at projektið skuldi kunnað verið inni aftur í september, oktober.

– Tá hava vit okkurt ítøkiligt at taka støðu til. Men so skal arbeiðið at byggja skipið bjóðast út.

Magnus Magnussen sigur, at tað er avgjørt sannlíkt, at tað skuldi borið til at byrja at byggja sjálvt skipið einaferð næsta summar.

– Hvussu leingi tað tekur at byggja eitt slíkt skip, veldst alt um, hvar skipið verður bygt og, hvussu stóra arbeiðsorku skipasmiðjan hevur.

–Men gongur heilt væl, hava vit eitt nýtt Suðuroyarskip seint í 2002. Men í øllum førum skuldi skipið verið liðugt einaferð í 2003

Skal sigla 21 míl

Tann nýggi Smyril verður eitt stórt framstig á nógvum økjum, afturímóti honum, sum er.

Hann verður bygdur eftir teimum krøvum, sum Strandferðslan hevur sett upp í tí stóra heftinum, sum varð gjørt um skipið í fjør, og sum varð lagt fyri suðuroyingar á almennum fundi seinasta heyst

Tó eru onkrar ábøtur gjørdar afturat. Eitt nú var upprunaliga ætlanin, at nýggi Smyril skuldi sigla 18 míl. Men tað er nú broytt, so at hann skal sigla 21 míl.

– Tað gevur eina siglingstíð ímillum Suðuroynna og Havnina uppá hálvan annan tíma, ella fimm minuttir útyir tað.

Annars verður ferðafólkatalið áleið tað sama, sum við hesum Smyrlinum.

Tvs, at nýggi Smyril fer at taka 800 ferðafólk um summarið og 500 um veturin.

Men umstøðurnar hjá ferðafólki verða munandi betri, enn tær eru nú.

–Luftskiftið verður betri og gongubreyt verður niðri á biladekkinum.

– Fult útgjørt sjúkrakamar verður umborð, eins og eitt kamar verður á biladekkinum til líkkistur.

Ferðafólkarúm, wc, gongir og lyftir fara at lúka øll krøv, spælipláss verður umborð til børn, hóskandi ferðafólkarúm, wc, gongdir og lyftir verða gjørd til rørslutarnað.

Og umborð verður eisini eitt fundar- og arbeiðshøli til 20-25 fólk, umframt at nøkur arbeiðskømur verða útgjørd við ymsari útgerð, eitt nú stikki til teldu.

Sostatt fer tað bæði at bera til hjá bólkum at hava fundir umborð, meðan siglt verður, og tað fer at bera til hjá fólki at arbeiða einsamøll í friði og náðum inni á einum kamari.

T.d. kann hugsast, at skúlaungdómur fer at brúka hetta høvi at gera fyrireika seg til skúlan.

Annars verða 100 kømur í nýggja Smyrli.

Ikki minst verður tað niðri á biladekkinum, at stór framstig verða.

Nýggi Smyril fer at taka um 200 bilar afturímóti teimum 110 bilunum, sum hesin Smyril tekur.

Hann verður einar 20 metrar breiður, tað er næstan fýra metrar breiðari enn Smyril sum er.

Biladekkið og portrið verður bæði breiðari og hægri enn á hesum Smyrlinum, og ferðafólk og bilar skulu verða heilt hvør fyri seg.

Eitt stórt framstig fyri bæði bilar og ferðafólk, verður, at gongubreytir verða gjørdar niðri á biladekkinum so at fólk sleppa frá at ganga inn ímillum bilarnar, tá ið farið verður í land, ella komið verður umborð.

Nýggi Smyril verður um 100 metrar langur.

Tað er ein sera hóskandi støðd, sum gevur møguleikar fyri bíligum rakstri.

TÆNARA-LÆRLINGUR
Á HOTEL HAFNIA

Vit sóknast eftir umsøkjarum til lærlingastarv sum verður sett til heystar



Tað krevst, at umsøkjarin:
- er fyrikomandi
- er álítandi
- kann arbeiða sjálvstøðugt og skjótt
- hevur yvirlit
- dugir at samstarva
- hevur lokið "Tek 2" innan hotel- og matstovuøki (møguleiki verður at ogna sær eitt "Tek 2"-prógv á "Hotel & Restaurantskolen" í Keypmannahavn ella Ålborg í døgunum 1. aug. til 30. okt.)

Útbúgvingin sum tænari gevur stórar framtíðarmøguleikar, bæði her heima og í útlondum. Útbúgvingin gevur næmingum hollan kunnleika innan nógv ymisk øki. T.d. læruna um vín, øl, spiritus, kaffi o.s.fr.

Harafturat lærir tú fakorð á fleiri málum, sølu og tænastu, rokniskap, teldufrøði, matgerð og útskering av ymsum kríatúrum, fiski og fugli.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við, at venda sær til:
Rósu Mariu R. Brodersen
ella
Michael Jensen

P/F Hotel Hafnia
Tel 31 32 33 • Fax 31 52 50

Nú mugu vit royna at finna stevið aftur

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað er onki at ivast í, at samstarvið ímillum Landsverkfrøðingin og P/F Vágatunnilin hevur fingið eitt hart skot fyri bógvin eftir tí, sum er farið fram seinastu dagarnar.

Landsverkfrøðingurin og P/F Vágatunnilin hava skriva undir eina avtalu um samstarv í sambandi við vegirnar tilVágatunnilin.

Eftir hesi avtaluni skuldi Landsverkfrøðingurin standa fyri at bjóða vegirnar út og tá ið tilboðini vóru komin inn, skuldi hann eisini gera eitt tilmæli um, hvør skuldi fáa arbeiðið.

Men síðani eru Landsverkfrøðingurin og P/F Vágatunnilin farin heilt skeivt av hvørjum øðrum.

Landsverkfrøðingurin mælti til at Byggitek skuldi fáa arbeiðið, tí teir høvdu tað lægsta tilboðið. Og hann hevur somuleiðis funnist at framferðini hjá Vágatunlinum.

Hinvegin hevur P/F Vágatunnilin gjørt av at ganga ímóti tilmælinum hjá Landsverkfrøðinginum.

Og samstundis hevur nevndarformaðurin í P/F Vágatunlinum, Klæmint Weihe, funnist at Landsverkfrøðinginum fyri at hava brotið tagnarskylduna.

Men hvat verri er: Hann hevur eisini funnist at, at ráðgevingin hjá Landsverkfrøðinginum í hesum máli, hevur ikki verið nøktandi.

Hann sipar m.a. til, at eftir avtaluni skuldi Landsverkfrøðingurin seta seg væl og virðiliga inn í tilboðini.

Men hetta heldur Klæmint Weihe ikki at hann hevur gjørt, áðrenn hann gav P/F Vágatunlinum sítt tilmæli. Tvørturímóti mátti leiðslan í P/F Vágatunlinum sjálv útvega sær ymsar upplýsingar, sum ráðgevarin átti at havt útvegað.

Og tað vóru hesir upplýsingar, sum gjørdi at P/F Vágatunnilin kom til ta niðurstøðu, at uppskotið hjá J&K Petersen var best, hóast tað ikki var tað lægsta.

Leiðslan í P/F Vágatunlinum sigur, at hon er komin til hesa niðurstøðuna, eftir at ymisk viðurskifti eru kannað, eitt nú fíggjarlig styrki hjá feløgunum, tekniskur førleiki. Og eitt, sum talaði nógv ímóti Byggitek var, at Pihl & Søn skuldi verða undirarbeiðstakari og tað stríðir ímóti endamálinum at føroyingar skuldu gera so stóran part av arbeiðnum, sum gjørligt.

Trýst elvir til móttrýst

Vit hava spurt nevndarformannin í P/F Vágatunlinum, um tað fær nakrar avleiðingar fyri avtaluna við Landsverkfrøðingin, at partarnir beinanvegin blivu so ósamdir. Men eftir, hvat skilst á honum, er støðan eitt sindur flótandi í løtuni.

– Trýst elvir til móttrýst, hevur onkur navnframur sagt.

Men Klæmint Weihe heldur, at tað er neyðugt, at partarnir setast niður at tosa um viðurskiftini.

Men hann heldur ikki, at samskiftið ímillum Landsverkfrøðingin og P/F Vágatunnilin skal fara fram í fjølmiðlunum.

– Nú eg eisini havi sagt mína hugsan alment í hesum máli, er tíðin komin til at partarnir setast saman at tosa um hetta, heldur enn at nýta fjølmiðlarnar at bera boð okkara millum, sigur hann.

Hann sigur, at tá ið tey fólk, sum hava við málið at gera, eru aftur í Føroyum, verður tosað nærri um hvat kann gerast, fyri at finna stevið aftur. Hann sipar m.a. til, at stjórin í P/F Vágatunlinum, Dávid Reinert Hansen er burtur hesa vikuna.

Landsverkfrøðingurin er uttanlands og verður ikki aftur, fyrrenn mitt í næstu viku.

Ísland neyvan meklari

Ísland fer neyvan at mekla í fullveldismálinum, uttan so at bæ›i Danmark og Føroyar bi›ja um hetta. Ta› sigur íslendski rá›harrin, Siv Fri›leifsdóttir, sum vitjar í Føroyum í hesum døgum

DÁNJAL HØJGAARD

Møguleikin fyri, at ein tri›i partur kemur upp í samrá›ingarnar millum Føroyar og Danmark er av álvara vor›in aktuellur.

Eftir har›a fundin millum stjórnina og landsst‡ri› hósdagin bo›a›i landsst‡ri› frá, at ta› umhugsar møguleikan at fáa ein tri›ja part upp í samrá›ingarnar.

Poul Nyrup Rasmussen, forsætisrá›harri, vísti beinanvegin møguleikanum frá sær. Fullveldi› er eitt mál millum Føroyar og Danmark, og ongan annan, sló hann fast.

Mugu vera samd

ST hevur veri› nevnt sum ein møguligur semingsstovnur í fullveldismálinum. Og íslendska stjórnin hevur - eftir fyrispurningi úr Altinginum - bo›i› seg fram.

Men Ísland fer neyvan at átaka sær uppgávuna sum meklari, uttan so at Danmark og Føroyar eru samd um, at fáa Ísland upp í máli›. Ta› sigur íslendski rá›harrin, Siv Fri›leifsdóttur.

-Ta› sigur seg sjálvt, at vilt tú hava ein tri›ja part upp í sum meklara, so má hetta vera eitt felags ynski frá pørtunum.

-Vilja bæ›i Føroyar og Danmark hava Ísland uppí sum tri›ja part, so vildi Ísland umhugsa› hetta. Men í dag er ikki líkt til, at hetta er eitt ynski úr Danmark - heldur tvørturímóti, sigur íslendski rá›harrin.

Einki endamál

Spurningurin er, hvat Ísland ger, um Føroyar av sínum eintingum venda sær til David Oddson, forsætisrá›hara at fáa hann at vera semingsmann.

Íslendski rá›harrin dugir ikki at siga hvussu íslendska stjørnin hev›i handfari› ein slíkan fyrispurning. Men sambært hana er ta› ikki sannlíkt, at landsst‡ri› hev›i fingi› naka› burturúr - so leingi sum Danmark er ímóti uppílegging:

-Eg dugi ikki at síggja, hvat gott i› kann koma burturúr at átaka sær leiklutin sum meklari, um annar av pørtum avgjørt er ímóti hesum, sigur Siv Fri›leifsdóttir og sipar til Danmark.

Siv Fri›leifsdótti sigur, at hon talar bert fyri seg sjálva. Ikki fyri íslendsku stjórnina. Men okkurt bendir á, at stø›an hjá íslendsku stjórnini neyvan er ólík hennara egnu.

- Máli› er ikki vi›gjørt (í íslendsku stjørnini, red.) teir seinastu dagarnar. Men sjálv haldi eg ikki, at ta› ber til at mekla, uttan so at bá›ir partar taka undir vi› hesum, tekur Fri›leifsdóttir uppaftur.

Sosialurin royndi at fáa eina vi›merking frá Davidi Oddssyni, forsætisrá›harra. Ta› eydna›ist ikki.

- Eg dugi ikki at síggja, hvat gott i› kann koma burturúr at átaka sær leiklutin sum meklari, um annar av pørtum avgjørt er ímóti hesum, sigur íslendski rá›harrin, Siv Fri›leifsdótttir.

SEV drálar vi› trygdini

Fimm mána›ir eftir, at SEV lova›i at seta upp eina ávaringarskipan vi› nor›asta vatnbrunnin vi› Vestmanna, er framvegis einki hent

DÁNJAL HØJGAARD

-Eg má vi›ganga at vit hava ikki fingi› hatta upp á pláss enn.

Hetta seg›i Pól Joensen, lei›ari á Fossáverkinum vi› Sosialin mitt í vikuni.

Ein familja vi› trimum børnum fekk eina skakandi uppliving, tá SEV uttan nakra ávaring slepti vatni› á tey. Hetta hendi í fjør summar, og familjan kærdi til SEV.

Í vikuni

Nú sigur lei›arin á Fossáverkinum, at ávaringarskelti og alarmur ver›a sett upp vi› byrgingina fyrsta dagin.

-Vit skuldu í øllum førum fingi› skelti› upp í hesi vikuni, og vilja arbei›a fyri, at alarmurin eisini ver›ur kemur upp hesa vikuna, sigur lei›arin á Fossáverkinum.

Váttligt upplivilsi

Váttliga familjuútfer›in var› umrødd í Sosialinum í januar.

Tvey vaksin og tr‡ børnum vóru farin út at njóta ve›ri› ein gó›an summardag í fjør. Foreldrini slanga›u sær í sólini ni›anfyri vatnbrunnin og børnini spældu í nánd, tá vatni› knappliga fossa›i oman ímóti teimum.

Tey máttu renna undan vatninum, og soviposar og leikur fóru til stroks vi› fló›ini.

SEV tappar av og á vatn úr nor›asta vatnbrunninum. Vatni› streymar út gjøgnum eitt stórt rør ni›ast í byrgingini, og ta› er ikki rá›iligt at standa fyri.

Tappa› hevur veri› øll árini. Men hvørki alarmur ella skelti hava bo›a› frá vanda.

Á›renn fer›afólkatí›ina

Tá máli› kom fram lova›i SEV-stjórin, Klæmint Weihe, at ein ávaringarskipan fór at ver›a sett upp. Hann rokna›i vi›, at hetta fór at ver›a gjørt á›renn fer›amannatí›in byrja›i.

Verklei›arin Pól Joensen váttar, at hann hevur fingi› bo›ini. Hann sigur, at hann hevur veri› burtur frá arbei›num í tríggjar mána›ir, og at hetta er ein grund til, at skelti og alarmur ikki eru sett upp enn.

Men sambært verklei›aranum ver›ur trygdin nú fingin í rættlag fyrsta dagin.

Tá søgan um dramatisku hendingina vi› eina av vatnbrunnunum hjá SEV kom fram í januar lova›i lova›i Klæmint Weihe, SEV-stjóri, at fáa trygdina í rættlag.

...úr Føroyum 7. juli, 21. juli og 4. august

Costa Dorada

Flogfelag Føroya skipar aftur í ár fyri ferð til gullstrondina í Spania, Costa Dorada. Flogið verður beinleiðis úr Føroyum 7. juli, 21 juli og 4. august.

Gist verður í kenda feriubýnum Salou, ið liggur við stóru Costa Dorada strondina. Beint við liggur tað størsta stuttleikastaðið, Port Aventura, umframt tað stóra "Vatnlandið". Eisini verður skipað fyri útferðum.

Møguleiki er at velja ímillum 3 ymisk hotel ella íbúðir.

Ring ella støkk inn á gólvið og fá meira at vita um hendan frálíka møguleikan.

PRÍSDØMI:
Hotel Michelangelo
**+, 2 fólk............. 8.900,- pr. pers.
1/2 pens.
Bólkur min. 10 fólk..... 7.900,- pr. pers.
1/2 pens.

PRÍSDØMI:
Hotel Europa
***, 2 fólk........ 9.100,- pr. pers.
1/2 pens.

PRÍSDØMI:
Íbúð Uolas ella íbúð Aqurio
***, 4 fólk........ 6.800,- pr. pers.

PRÍSDØMI:
Hotel Estival Park
****, 2 fólk......... 10.250,- pr. pers.
1/2 pens.

ÚTSELT 7. JULI OG 4. AUG.

Í øllum prísum er íroknað: Flogferð, ferðaavgjøld og innivist

• Avsláttur fyri børn 2-12 ár: 1.500,- kr. umframt hópin av øðrum avsláttarskipanum. Kom inn og hoyr nærri...

FLOGFELAG FØROYA
Áarvegur 6 • Postboks 3225 • FO-110 Tórshavn
Tel 31 10 25 • Fax 31 86 70 • e-mail: travel@ff.fo

petur & petur • 320870